# Ger kvettið í Runavík á tunnilsdegi



Handlar og fyritøkur, sum eru við í Handilsmiðdeplinum í Runavík, hava í sínum útboði flestu vørur og tænastur, ið hugsast kunnu

**Handilsmiðdepilin í Runavík, sum hevur opið til klokkan 20 leygarkvøldið, bjóðar øllum vælkomnum til bygdar, nú ókeypis verður at koyra um Norðoyatunnilin**

HANDILSLÍV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Handilsmiðdepilin í Runavík letur tað ikki fara aftur við borðinum, at ókeypis verður at koyra um Norðoyatunnilin leygardagin, 31. januar.

Allir handlarnir, sum eru við í felagsskapinum, fara at hava langan leygardag – ella tunnilsdag, sum tað nú verður rópt, tá koyringin um tunnilin er ókeypis.

Opið verður soleiðis leygarkvøldið til klokkan 20.

### Livandi felagsskapur

Flestu handlar og fyritøkur í Runavíkarøkinum eru limir í Handilsmiðdeplinum, sum er ein livandi felagsskapur.

Í sínum útboði hava hesir handlar og fyritøkur flestu vørur og tænastur, ið hugsast kunnu.

Tú finnur handlar, sum selja bøkur, leikur, klæði, skógvar, ítróttarklæði/skógvar, búnýtisvørur, hvítvørur, timbur og amboð, telduútbúnað, og í økinum eru eisini telduhandlar og peningastovnar.

### Útsøla leygardagin

Úr Runavík verður sagt, at útsølan hjá handlum og fyritøkum í økinum byrjaði 21. januar, og hendan heldur úr sjálvandi fram leygardagin, nú ókeypis verður at koyra um Norðoyatunnilin.

- Vit bjóða øllum vælkomnum til býin. Hetta er staðið, har tú kanst gera kvettið leygardagin, siga tey, sum standa aftanfyri Handilsmiðdepilin í Runavík.

# Bókabúðin letur upp stundisliga

**- Vit lata altíð dyrnar upp klokkan 9 á morgni, tí vit hava nógv viðskiftafólk innan skrivstovur og skúlar, sum hava brúk fyri okkum stundisliga, sigur Jákup Vágsheyg, søluleiðari**

HANDILSLÍV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Jákup Vágsheyg, sum er parteigari og starvast í Bókabúðini í Runavík, sigur, at tað setir eitt ávíst lív í økið, tá tunnilsdagur er.

- Vit kunnu siga, at fólk leggja sær dagin eitt sindur øðrvísi til rættis, soleiðis at nógv ikki fara til handils fyrr enn út á seinnapartin.

Hann vísir á, at tunnilsdagurin er eitt sindur serstakur, tó at hann kanska ikki er so ógvuliga kollveltandi.

- Jú, hetta er ein hugnaligur dagur, har tú eisini sært fólk, sum tú kanska ikki hittir so ofta.

Jákup sigur, at Bókabúðin er tann handilin í økinum, sum altíð letur upp stundisliga á morgni.

- Vit hava nógv viðskiftafólk innan skrivstovur og stovnar, og vit hava nógv viðskiftafólk innan skúlar. Fólk hava brúk fyri okkum stundisliga, og tí lata vit altíð upp klokkan 9 á morgni, hvønn dag í vikuni.

Opið er vanligar yrkadagar frá klokkan 9-17.30, fríggjadag frá klokkan 9-18 og leygardag frá klokkan 9-14.

Nú tunnilsdagur er leygardagin, fer Bókabúðin eins og hinir handlarnir í Handilsmiðdeplinum í Runavík at hava opið til klokkan 20.

Bókabúðin hevur allan útbúnað til skrivstovur og skúlar.

- Vit selja ikki skrivstovumøblar, men vit selja skrivstovustólar. Vit selja heldur ikki teldur, men patrónir og printarar. Annars hava vit alt, sum hoyrir skrivstovum og skúlum til í tí dagliga.

Jákup Vágsheyg, søluleiðari, sigur, at Bókabúðin minst eina ferð um vikuna koyrir bílagdar vørur út til skrivstovur og skúlar, har koyrandi er.



Bókabúðin er handilin, sum hvønn morgun letur dyrnar upp klokkan 9

